# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*"Tað, oyrað ikki hoyrir, og eygað ikki sær, tað hevur hjartað ikki ilt av.".*
*Kelda: Plakat í Hoyvíkar skúla*

# Infiniti til Evropa í 2008



*Infiniti FX45 er ein luksus SUV, sum fæst bæði við V6 og V8 motorum. Hesin er ein 4.4 litur V8 við 315 hk. 20" hjólini eru standard*

**Tað verður ein løta enn til luksusbilarnir hjá Nissan, Infiniti, koma til Evropa. Infiniti er luksusbilmerki hjá Nissan**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eins og Toyota hava Lexus og Honda hava Acura, sum serliga eru ætlaðir til amerikanska marknaðin, er Infiniti luksusbilmerki hjá Nissan.

Infiniti hava als ikki verið seldir í Evropa áður, men nú eru teir ávegis.

Eftir ætlan koma teir næsta ár til Kina og Ukraine, og í 2008 koma teir so til Evropa og verða eisini seldir í Danmark og í Føroyum.

Infiniti, ið verða gjørdir bæði í Japan og USA, eru stórir flottir luksusbilar við V6 og V8 motorum. Um teir vórðu seldir í Danmark í dag, hevði prísurin ligið frá 800 túsund til 1,4 millión. Her hjá okkum verða teir ivaleyst væl bíligari.



*Infiniti M45 er ein stórur luksusbilur, ið fæst við V8 motorum upp til 340 hk*



*Infiniti G35 Sport Coupé. Hesin fæst eisini sum sedan og er ein sera væl umtóktur bilur í USA*